# Føroyski brúkarin livir í einum U-landi

**Neyðugt við eini lóggávu sum kann vísa brúkaranum á tey rættindini, hann hevur. Enn er langt á mál, men ein loysn er ávegis**

BRÚKARAMÁL
*Snorri Brend*

– Tá talan er um vernd av brúkarunum eru Føroyar meiri at meta sum eitt U-land. Vit hava onga lóg um Marknaðarføring.Og vit hava heldur onga lóg um Brúkaravernd.

– Orsakað av hesum er brúkarin í villareiði. Hann stendur tí mangan óhjálpin, og er tí als ikki nøgdur við støðuna. Men hvat skal hann gera, tá hann onga lóg hevur at halda seg til?! Og hvagar skal hann fara?

Hetta var nakað av tí, sum kom fram á pallborðsfundi í ÍSF-húsinum í farnu viku har brúkaramál vóru viðgjørd á politiskum stigi við umboðum fyri allar flokkar á tingi.

Støðið til fundin varð tikið úr eini frágreiðing um skipan av viðurskiftinum hjá brúkarunum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Hesi viðurskifti eru ymisk, men tað tykist sum um viljin til at gera okkurt munagott á hesum øki er til staðar.

Brúkarasamtakið skipaðI fyri fundinum, sum ikki taldist millum teir mest fjølmentu. Kortini kom nógv áhugavert fram, sum so líðandi fer at betra um umstøðurnar hjá føroyska brúkaranum.



*Sum brúkari er ein ofta illa vardur móti handilsmanninum, tí teir arbeiða ikki undir eins viðurskiftum. Brúkarasamtalið ynskir at føroyingar fáa í lag lógir, sum verja brúkaran móti misbrúki*

*Mynd: Jens Chr. Vang*

### Neyðugt við einum triðja parti

Í øðrum londum er felagsskapir hjá brúkarunum høgt í metum og verða nógv brúktir av fólki. Í Føroyum er ein ikki komin so langt enn.

Ein spurningurin, sum varð tikin fram á pallborðsfundinum var talið av klagum, ið kunnu koma fram. Eitt felag fyri brúkarar hevur verið virkið, og fekk tað okkurt árið einar 60 klagur frá ónøgdum brúkarum. Hesar klagur vóru ofta eftir eitt bilkeyp ella um viðurskifti mótvegis tryggingini.

Mangar av hesum klagum vóru komnar upp, tí at kundin og handilsmaðurin tosaðu framvið hvørjum øðrum og tí ikki skiltu, hvør trupulleikin var. Men tá so ein triði partur kom uppí fekk málið oftast eina skilagóða loysn.

Sum samfelagið er skipað í dag er neyðugt at tann einstaki brúkarin følir, at hann kann hava eina lóg at halda seg til, um so er at hann er ónøgdur við eina tænastu, vøru ella hvat tað skal vera. Greitt er, at er brúkarin nøgdur so er handilsmaðurin tað eisini. Spurningurin er bara, hvussu ein kemur fram til tað.

Fyri bert fáum árum síðani var tað so her á landi, at nógvir handlar vóru og at brúkarin kendi hann, sum handilin átti. Var talan um minni pláss so var bert tann eina handilin, og mangan var tað trupult hjá fólki at klaga, um tey vóru ónøgd við einhvørja tænastu: Samfelagið er jú lítið, og tað kundi meiri enn so henda seg at brúkarin var í familju við handilsmannin.

### Kenna ikki eigaran

Í dag er støðan nógv broytt. Handlarnir eru vorðnir størri og talan er um færri eigarar. Haraftrat kemur, at tann einstaki brúkarin als ikki kennir hann, sum eigur handilin.

Eitt er tó ikki broytt, og tað er at handilsmaðurin ynskir at fáa kundar inn í handil sín. Hetta er tann altavgerandi spurningurin fyri handilsmannin. Og skal kundin halda áfram við at koma í sama handil, er neyðugt at veita honum eina góða tænastu.

Har hetta ikki røkkur er neyðugt við lóggávu, bæði tá talan er um marknaðarføring og um brúkaravernd. Hesum verður arbeitt við í løtuni, og tí er ikki óhugsandi at vit hava lógir fyri hesum áðrenn langt um líður. Tað skiltist, at Kappingarlógin er ávegis til víðari viðgerð í løgtinginum.

### Eina føroyska lóg fyri føroyingar

Á fundinum varð nógv tosað um hesar lógir, ella tørvin á teimum.

Nevnt varð, at slíkar lógir finnast í grannalondum okkara, men at vit ikki enn eru komin so langt á hesum økinum. Hinvegin so kann hetta drálið vísa seg sum ein fyrimun. Møguleiki er nú at gera okkara egnu og føroysku lóg á hesum økinum, har vit so fáa høvið at taka tað besta út úr lógunum í øðrum londum.

Okkurt fer helst at henda á hesum økinum, tí umboðini fyri samgonguna vístu fleiri ferðir til samgonguskjalið, har staðfest er at ein Brúkaralóg skal setast í verk í Føroyum.

## Brúkarasamtakið rættir sína hond til brúkaran

Hvørt ár keypir føroyski brúkarin vørur og tænastur fyri nærum 10 milliardir krónur.

Her er talan um dagligvørur, samskiftistænastur, hús, bilar, tryggingar og annað. Hesar verða keyptar frá útbjóðarum, sum ofta eru skipaðir nógvar ferðir betri enn vanligi einstaki brúkarin. Út frá hesum kann tí staðfestast, at partarnir á marknaðinum virka ikki á jøvnum føti.

Trupulleikin í Føroyum er, at vit hava ongan skipaðan brúkarapolitikk sum grannalond okkara og onnur framkomin lond. Eftir hesum brúkarapolitikki verður brúkarin vardur, samstundis sum krøv verða sett til útbjóðaran um t.d. marknaðarføring og upplýsingarskyldu.

Tann føroyski brúkarin er tí snøgt sagt undirlagdur tær treytir sum hann fær boðið. Basta!

Her kemur Brúkarasamtakið inn sum ein sjálvboðin felagsskapur, sum setur brúkaraverndina í hásætið. Fremsta uppgávan er at fáa politiska myndugleikan at røkja sínar skyldur við at seta í verk eina brúkaralóggávu og ein brúkarastovn, til tess at tryggja brúkaranum síni rættindi.

Brúkarasamtakið varð sett á stovn 30. Oktober í 2002.

## Fimm forsyndaðir føroyingar

**Dømi 1:** Tú hevur verið til handils, og fert glaður heim til húsa. Heimkomin leggur tú merki til, at vøran tú júst hevur keypt gekk út sama dag. Tú følir teg snýttan, men stendur ivandi: Hvat er til ráða at taka?

Tú avger at fara aftur til keypmannin við vøruni, og fært hana býtta um. Við hesi loysnini eru bæði tú og keypmaðurin nøgdir.

Men hvat: Nakrar dagar seinni ert tú úti fyri tí sama og hjá sama keypmanni. Hvat skalt tú nú gera, tí tvinnandir eru kostirnir: Annaðhvørt fert tú aftur til keypmannin við vøruni, ella bítur tú hetta í teg. Tú hugsar sum so: "Eg vil heldur sita heima og forsyndast, enn at verða skýrdur sum grenjari av keypmanninum".

**Dømi 2:** Tú sært lýsingina um eina tænastu sum kostar 0,- kr., men tá tú spyrt nærri, vísir tað seg, at fyri at kunna gera brúk av hesi, er neyðugt at keypa eitt tól aftrat fyri nógvan pening. Ella tú fært prísin uppgivnan á eini vøru, har mvg'ið ikki er roknað uppí, og í triðja lagi, at tann fráboðaðI prísurin bert er fyri 1/4 ella 1/2 kilo av vøruni.

**Dømi 3:** Tú fært lýsingarblaðIð við postinum um morgunin, men tá tú seinnapartin kemur í handilin er vøran langt síðani útseld.

**Dømi 4:** Tú ert farin til handils við børnunum. Tit eru liðug at keypa inn, og koma at standa í bíðiraðnum við kassan. Og har - ja, beint har! - hevur handilsmaðurin sett alt góðgætið. Hetta argar teg almikið, tí tú hugsar at hetta er gjørt tilvitað frá handilsmansins síðu. Er ongin sum kann veita verju móti slíkum?

**Dømi 5:** Tú ynskir at keypa eina teldu. Tú fert í telduhandilin fyri at fáa tær upplýsingar um hesar teldur. Tú fært ein hóp at vita um alskyns teldur, men dentur verður samstundis lagdur á, at teldan frá í gjár longu er gamaldags, men at hon, tú í dag keypir, er tann besta á marknaðinum og fæst eisini fyri ein góðan prís, - hóast tú kanska longu í morgin verður noyddur at dagføra telduna.

---

Hetta eru alt viðurskifti, ið føroyingar kenna til. Og hetta eru samstundis viðurskifti sum føroyingar argast inná.

Tí tann stóri spurningurin er nevniliga, - hvar skalt tú fara við øllum hesum forargilsunum? Hvør kann hjálpa tær, soleiðis at tú sleppur undan slíkum aftur?

Eitt av teimum feløgum, ið ynskir at gera nakað fyri tann einstaka brúkaran er Brúkarasamtakið. Hetta felag sá dagsins ljós fyri júst tveimum árum síðani, og ynskir fyrst og fremst at verja áhugamálini hjá brúkarunum.

Ein háttur at røkka hesum endamáli er at ávirka politiska myndugleikan. Og hetta varð gjørt í farnu viku, tá skipað varð fyri pallborðsfundi um brúkaramál saman við umboðum fyri allar flokkar á tingi.

Grundarlagið undir fundinum var ein frágreiðing frá Ráðharraráðnum hjá Norðurlandaráðnum um brúkaraøkini í Føroyum, Íslandi og Grønlandi.

## Føroyingar eru ikki ótilvitaðir brúkarar

**Norðurlendsk kanning vísir kortini, at føroyingar eru eftirbátar tá tað snýr seg um brúkaravernd**

Ein arbeiðsbólkur undir Norðurlandaráðnum hevur latið úr hondum eitt álit um tað tey kalla "forbruger-organisering".

Henda kanningin er gjørd í Føroyum, Íslandi og Grønlandi, og ynskti at fáa fram í ljósið skipanina og reguleringina av brúkaraarbeiðinum í mun til støðuna í hinum norðurlondum.

Málið við ætlanini var at lýsa, hvussu ein kann fáa sum mest burtur úr við brúkarakunning og rættindum teirra við lítlari fíggjarligari orku, serliga tá talan er um viðurskiftini millum brúkarar og kappingarmyndugleikar.

Í hesum bólki sótu: Hans Pauli Strøm, sum umboðaði Brúkarasamtakið; Bo Vestergård fyri grønlendska brúkararáðIð og Jóhannes Gunnarsson, sum umboðaði sjálvbodna brúkarafelagið í Íslandi, Neytendasamtøknin. Turið Debes Hentze, løgfrøðingur savnaði tilfarið saman.

### Langt millum londini

Viðurskiftini í Føroyum kunnu ikki beinleiðis samanberast við tey í Íslandi og Grønlandi.

Í mun til grannalond okkara í útnorðuri er Føroyar í eini heilt aðrari støðu, tá talan er um lóggávu fyri brúkararnar. Her finst hvørki kærunevnd, ein almennur brúkaramyndugleiki, eingin brúkaralóg, og eingin peningur er heldur játtaður til at stuðla teimum sjálvbodnu áhugafeløgunum á økinum.

Skal ein tí samanbera viðurskiftini, má tað meiri verða ein lýsing av hvør skipan, sum kann setast í verk her, út frá royndunum hjá hinum.

Áður fanst eitt felag fyri brúkarar, men hetta virksemið helt uppat tí játtan fekst ikki frá politiskari síðu, hvørki tá talan var um fígging og lóggávu. Og hetta hendi hóast felagið kundi vísa á ein áhuga millum fólk fyri tí.

Hetta er kortini ikki tað sama sum at føroyingar eru ótilvitaður brúkarar, sum lata alt um seg ganga. Her verður víst til nýggja felagið, sum ynskir at vísa á hetta misrøkta økið mótvegis politikkarunum. Frágreiðingin staðfestir tí eisini, at áhugin fyri brúkaramálum tykist næla millum føroyingar.

Royndirnar úr Grønlandi og Íslandi vísa týdningin av lóggávum á økinum, og her verður við spenningi sæð fram ímóti at Kappingarlógin skal setast í verk. Víst verður á, at í Íslandi hava tey serliga góðar royndir av eini lóg um marknaðarføring.

## Orð um brúkaramál

*- Brúkarafeløg eru væl skipaði í grannalondum okkara, t.d. Íslandi og Grønlandi. Í Føroyum er tann privata nýtslan einar 4 milliardir um árið, men vit hava ongan virknan brúkarapolitikk. Hetta økið eigur at raðfestast hægri, tí við nøgdum brúkarum fáa eisini fyritøkurnar eitt betri úrslit.*

*(Erika Hayfield, granskari í forbrúki)*

*- Tær fríu marknaðarkreftirnar hava givið okkum tað vælferðarsamfelagið, vit í dag hava. Onnur lond, har tann almenni sektorurin er stórur, hava tey ikki nógvar vørur á handilshillunum. Vit hava øll mat, klæðir og hús. Og munnu tey flestu ikki vera nøgd um tað?*

*(Óli Breckman, løgtingsmaður, A)*

*- Vit eiga hvørki eina lóg um Marknaðarføring ella um Brúkaravernd, Vit eru tí at meta sum eitt U-land í so máta. Her eru neyðugt við einum kærustovni fyri brúkararnar, og tað ynski eg sjálvur at gera nakað við.*

*(John Johannesen, løgtingsmaður, C)*

*- At verja brúkaran við lóg er alneyðugt. Í dag hevur brúkarin hvørki ein almennan ella privatan stovn at koma til við kærum sínum, um hann ikki er nøgdur. Vit vilja tí vera við til at hetta verður framt í verki skjótt.*

*(Heidi Petersen, løgtingskvinna, E)*

*- Lógir sum verja brúkaran eru ávegis í samgonguni. At vit nú arbeiða so miðvíst við hesum ger at vit nú hava eitt ótrúliga gott høvi at gera okkara egnu lóg, sum hóskar til okkara serføroysku viðurskifti.*

*(Alfred Olsen, løgtingsmaður, B)*

*- Uttan lógir, sum verja brúkaran er hann mangan illa staddur. Tað er ikki altíð at hann kann gjøgnumskoða hvat í veruleikanum liggur í tilboðnum, og tá er lætt at føla seg snýttan. Men hvar skal brúkarin venda sær, og hvagani kann hann fáa eina óhefta vegleiðing, áðrenn hann skal gera eitt keyp?*

*(Bill Justinussen, løgtingsmaður, F)*

*- Vit mugu altíð ansa eftir at vit ikki verða ov nógv ansaði við slíkum lógum. Tí brúkarin hevur eisini sjálvur eina ábyrgd, tá hann keypir eina vøru.*

*(Dánjal Petur Hansen, løgtingsmaður, D)*